# Russlandssáttmálin átti at farið í uttanlandsnevndina

**Málið um russlandssáttmálan er av so avgerandi týdningi, at tað átti at verið viðgjørt í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum, so landsstýrismaðurin fekk neyðuga mandatið frá parlamentarisku skipanini, heldur John Johannessen**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

John Johanesen, formaður í uttanlandsnevnd Løgtingsins fer á tingfundi í morgin at spyrja løgmann, um russlandssáttmálin ikki átti at verið viðgjørdur í uttanlandsnevndini.

Hann spyr løgmann, um hann kann greiða frá, hvussu hann tulkar grein 54 í stýrisskipanarlógini, ið áleggur landsstýrinum at ráðføra seg við uttanlandsnevndina, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning?

- Kann løgmaður greiða løgtinginum frá, hvørjar yvirskipaðar reglur, ið landsstýrið hevur fyri, hvørji mál av uttanlandspolitiskum slag eiga at verða løgd fyri uttanlandsnevndina hjá løgtinginum, áðrenn niðurstøða verður gjørd?

- Heldur løgmaður, at mál av slíkum slag, sum nýliga staðfesta fiskiveiðuavtalan við Russland áttu at farið í uttanlandsnevndina til ráðførslu, áðrenn landsstýrið tók støðu?

Johan Johannesen vísir á, at í grein 54 í Stýrisskipan Føroya er ásett, at "Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning."

Hann reisir tí spurningurin, um ein broyting í fiskiveiðuavtaluni millum Føroyar og Russland, har føroyska svartkjaftakvotan lækkar 53 prosent og harvið hevur avgerandi broytingar við sær fyri vinnumynstrið, er ein avgerð, ið hevur so mikið stóran týdning, at landsstýrismaðurin átti at ráðført seg við uttanlandsnevndina, áðrenn avgerð varð tikin.



*John Johannessen er formaður í uttanlandsnevndini hjá løgtinginum. Hann heldur, at ein so týðandi millum tjóða avtala, sum russlandssáttmálin, átti at verið viðgjørt í uttanlandsnevndini*

- Í øllum førum ber til at staðfesta, at eingin politisk viðgerð hevur verið av málinum yvirhøvur. Landsstýrismaðurin segði sjálvur í Degi og Viku, at hann ikki hevur luttikið í samráðingunum, men at tær eru farnar fram á embætismannastigi. Og sum formaður í uttanlandsnevndini kann eg staðfesta, at landsstýrið hvørki hevur ráðført seg við uttanlandsnevndina ella kunnað nevndina um gongdina í málinum, sigur John Johannessen.

Hann heldur, at málið er so mikið avgerandi, at tað hevði uppiborið eina politiska viðgerð, áðrenn endalig støða varð tikin. Somuleiðis haldi hann, at landsstýrið í hesum føri átti at ráðført seg við uttanlandsnevndina sambært grein 54 í stýrisskipanarlógini og harvið fingið neyðuga mandatið frá parlamentarisku skipanini at tikið støðu út frá. John Johannessen sigur eisini, at tað hava verið smærri mál enn hetta til ráðførslu í uttanlandsnevndini.

- Grundað á gongdina í hesum máli skjóti eg upp, at løgmaður ger greiðar leiðreglur til landsstýrisfólkini um, hvussu tey skulu tulka grein 54 í stýrisskipanini, soleiðis at tey í framtíðini ikki staðfesta millumlandaavtalur uttan neyðuga mandatið frá parlamentarisku skipanini, sigur John Johannessen í munnliga fyrispurninginum hjá Kaj Leo Johannesen, sum verður svaraður á tingfundi í morgin.

# Tórbjørn vil hava russlandssáttmálan á tingborð

**Tey fyrstu árini eftir at millumtjóða sáttmálar vórðu gjørdi millum Føroyar og onnur lond um fiskirættindi, var tað vanligt, at hesir vórðu lagdir fyri tingið. Hann spyr nú løgmann um hesi viðurskifti**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fleiri røddir eru nú á tingi sum halda, at russlandssáttmálin átti at verið viðgjørdur í politisku skipanini. Eisini Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, fer at seta løgmanni fyrispurning um hetta á tingfundinum í morgin.

Hann spyr løgmann, um hann hevur ásett nakað mark fyri, nær millumtjóða sáttmálar eru somikið týdningarmiklir fyri føroyska samfelagið, at teir eiga at vera lagdir fram á tingborð til umrøðu og møguliga avgerð?

Í øðrum lagi spyr hann løgmann, um hann heldur, at nýggi fiskirættindasáttmálin millum Rusland og Føroyar, fyri árið 2009, er av slíkum slagi, so týdningarmikil, at landsstýrið átti at lagt hann til umrøðu og avgerð tingsins?

Í triðja lagi vil hann hava at vita, um løgmaður er nøgdur við sáttmálan, bæði viðvíkjandi búskaparligu javnvágini landanna millum og nýggja býtinum ímillum vinnuligu áhugamálini í Føroyum?

Tórbjørn Jacobsen sigur í viðmerking til fyrispurningin, at nógv tey fyrstu árini, eftir at millumtjóða sáttmálar vórðu gjørdir millum Føroyar og onnur lond, um fiskiveiðirættindi, var tað vanligt, at hesir vórðu lagdir fyri tingið, áðrenn teir kundu góðkennast sum verandi galdandi.

- Hendan siðvenjan varð síðani niðurlaðað, slept, og landsstýrið hevur síðani suverent átt ræðisrættin hesum viðvíkjandi. Fyrst Fiskimálaráðið, og nú tykist Uttanríkisráðið eisini at hava fingið ein ávísan leiklut í so máta.

Hann sigur, at sáttmálin við Rusland er rammusáttmáli, sum samráðst verður um ár fyri ár. Sum so er nýggja avtalan, sum nú er undirskrivað á samráðingarferð í Arkangelsk, bert ein spurningur um at áseta nýggj virðir í einum sáttmála, sum var til frammanundan, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Hann vísir eisini á, at nú hevur nakað av kjaki verið um nýggju ásetingarnar, sum bøta um møguleikarnar í Barentshavinum, meðan veiðirættindini hjá eitt nú nótaflotanum, og partvíst ídnaðarflotanum, eru munandi skerd. Umboð fyri vinnuna hava ikki spart krútið, í einum lemjandi kritikki av landsstýrismanninum, sum hevur átikið sær ábyrgdina, tí samráðingarnevndin samráddist út frá einum greiðum politiskum mandati, sum hon hevði við sær í skjáttuni. Mong undrast á úrslitið, sum eftir øllum at døma er til greiðan fyrimun fyri russar, ímeðan býtið innanlands er endað í tí margháttliga lutfalli, at landsstýrið hevur keypt eina størri nøgd av toski og hýsu í Barentshavinum og goldið afturfyri við makreli og svartkjafti, sum serliga nótaflotin hevur fiskað Føroyum rættindini til.

- Virðið á sáttmálanum telur fleiri hundrað milliónir krónur, sum er ein rímiligur partur av útflutningsvirði landsins, tí er spurningurin, um hann ikki kemur undir ásetingina í §52 stk. 2, at vera somikið týdningarmikil, at hann eigur at vera lagdur fyri Tingið til umrøðu og avgerð. Spennandi verður at frætta hvat ovasti politiski leiðari landsins sjálvur heldur um nýggja sáttmálan, bæði um búskaparligu javnvágina og um nýggja býtið ímillum skipabólkarnar. Kanska hevur løgmaður eisini eitt boð uppá, um ikki allir sáttmálar av hesum slagi aftur áttu at verið lagdir fyri Tingi til umrøðu og avgerð, sigur Tórbjørn Jacobsen. Kaj Leo Johannesen, løgmaður, skal svara spurninginum á tingfundinum í morgin.



*Tórbjørn Jacobsen heldur, at síðani siðvenjan við at leggja millum tjóðaavtalur fyri tingið, hevur landsstýrið síðani suverent átt ræðisrættin hesum viðvíkjandi. Fyrst Fiskimálaráðið, og nú tykist Uttanríkisráðið eisini at hava fingið ein ávísan leiklut í so máta*